MARKAMÓTSNEVNDIN

Tórshavn 9. apríl 2018

Almannamálaráðið
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Mál viðvíkjandi markamótinum millum heimarøkt og stuðulsfólkaskipan

Markamótsnevndin fekk við skrivi frá Almannaverkinum, dagfest 14. februar 2018, mál um markamótið millum land og kommunu, har Almannaverkið vil hava Markamótsnevndina at taka støðu markið millum § 32 b í forsorgarlógini og § 9 í løgtingslóg nr. 19 frá 7. apríl 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Talan er um tríggjar vaksnar heimabúgvandi borgarar í kommunu A, ið allir eru undir 67 ár. Tveir av borgarunum eru fjølbrekaðir og búgva hjá foreldrunum. Hin triði, sum býr í egnari íbúð, er sera veikur vegna vøddasvinn og hevur tørv á hjálp og stuðuli 24 tímar um samdøgrið.

Almannaverkið upplýsir, at Almannaverkið veitir stuðul, sum t.d. vøku um náttina, frítíðartilboð á dagstovni, 1 til 1 stuðul í vikuskiftinum o.l. Fært verður fram, at hesir borgarar eisini hava tørv á hjálp til dagligt persónligt reinføri, og at Almannaverkið í løtuni nýtir av tillutaðu stuðulstímunum til persónligt reinføri. Almannaverkið hevur uppá fyrispurning frá Almannamálaráðnum við skrivi frá 6. apríl 2018 útgreinað tørvin hjá teimum trimum.

Almannaverkið metir, at hjálp til dagligt persónligt reinføri er partur av kommunalu skylduni at veita heimatænastu til heimabúgvandi borgarar.

Markamótsnevndin tulkar skrivið frá Almannaverkinum frá 14. februar 2018 so, at Almannaverkið vil hava kommunurnar at taka ábyrgd av persónligari røkt, so sum hjálp til persónligt reinføri til nevndu tríggjar borgarar, meðan Almannaverkið framvegis hevur ábyrgd av tænastunum eftir § 32 b í forsorgarlógini.

Skrivið frá Almannaverkinum kann evt. eisini skiljast so, at Almannaverkið vil sleppa stuðulspartinum eftir § 32 b og tískil vil geva kommununi fulla ábyrgd eftir § 9 í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m. Tað kundi hetta brotið bent á:

> ”Hesir borgarar bera brek og teimum tørvar hjálp til persónliga røkt. Teir eru soleiðis fyri, at Almannaverkið metir ikki, at teir kunnu stuðlast til persónliga røkt, og tískil metir Almannaverkið ikki, at hesir borgarar eru fevndir av § 32 b í forsorgarlógini um stuðul, men heldur eiga at verða fevndir av § 9 í lóg um heimatænastu og eldrarøkt.”

Kommunan hevur fingið málið til hoyringar frá Almannamálaráðnum. Kommunan svaraði við skrivi dagfest 1. mars.

Kommunan sigur m.a. so um ábyrgdina hjá Almannaverkinum eftir forsorgarlógini:

> ”Kommunan metir, at tá Almannaverkið veitir stuðul saman við møguligum øðrum tilboðum 24 tímar um døgnið, er talan um eina heildartænastu við samanhangandi hjálp til borgaran alt samdøgrið, soleiðis, at hann kann fasthalda ella uppbyggja sjálvstøðugt lív. Talan er um einstaklingafyriskipanir, har tænastan er so umfatandi, at hon kann samanberast við uppihald á stovni, so at siga kemur í staðin fyri uppihald á stovni, t.d. tí atlit kunnu vera tikin til rættin hjá borgarum at velja, hvar hann vil búgva (§1 19 í Breksáttmálanum) í øðrum lagi, tí ongi tøk stovnspláss eru.”

Fört varð eisini fram, at kommunan metti ikki, at tørvurin á røkt til hesar borgarar kundi nøktast við persónligari hjálp og røkt frá heimatænastuni.

Kommunan vísti eisini á, at arbeiðsbólkurin, ið varð settur niður millum land og kommunur at gera nærri vegleiðingar og nágreiningar av markamótum, hevði verið samdur um, at so fá fólk sum møguligt skuldu inn yvir borgaram. Báðir partar høvdu hildið, at tá Almannaverkið veitti stuðul 24/7, var skilabest, at Almannaverkið hevði ábyrgd av øllum tørvi á hjálp, stuðli, røkt v.m., men umboðini hjá landinum tó hildu, at rokning skuldi sendast kommununum fyri tann partin, sum snúði seg um røkt.

Sum bæði Almannaverkið og kommunan hava víst á, hvur Markamótsskjalið definerað markið millum heimatænastuna og stuðulstænastuna (Markamót 1) sum eitt ógreitt markamót.

Markamótsskjalið vísir á, at heimatænastan er skipað við løgtingslóg nr. 19 frá 2014 um heimatænastu, eldrarøkt v.m. og kunngerð nr. 126 frá 2014 um heimatænastu og gjald fyri heimatænastu, eldrarøkt o.a. Stuðulstænastan er hinvegin skipað við lovbekendtgørelse nr. 100 fra 1988 om offentlig forsorg eisini nevnd forsorgarlógin og í kungerð nr. 116 frá 2006 um stuðulsfólk til persónar við serligum tørvi, ið búgva heima.

Sum Markamótsskjalið endurtekur úr § 9, stk. 3 og 4 í lógini heimatænastu, eldrarøkt v.m., sigur lógin einans hetta um, hvat heimatænasta fevnir um:

”Heimahjálp verður veitt borgarum, sum hava tørv á persónligari hjálp, røkt ella stuðli”.

Og:

”Heimasjúkrarøkt fevnir um sjúkufyribyrging, sjúkrarøkt, endurmenning, uppleitandi arbeiði og almenna heilsuvegleiðing.”

Viðmerkingarnar til lógina um heimatænastu, eldrarøkt v.m. geva ikki týðandi íkast til tulkingina av nevndu hugtøkum.

Markamótsskjalið endurtekur síðan úr § 32 b í forsorgarlógini m.a., at uppgávan hjá Stuðulstænastuni er:

”at stuðla vaksnum heimabúgvandi frá 18 til og við 66 ár við serligum tørvi, sum eru rørslutarnað ella hava avmarkaðan sálarligan førleika, so at tey hava møguleika at liva eitt sjálvstøðugt og virkið lív”.

Endurtikið verður eisini um uppgávurnar hjá stuðulstænastuni úr § 1 í kunngerð nr. 116 frá 2006 um stuðulsfólk til persónar við serligum tørvi, ið búgva heima, at uppgávurnar fevna um:

”fylgi, eftiransni, vøku, umsorgan og sosialpedagogiska hjálp til heimabúgvandi persónar millum 18 og 66 ár við serligum tørvi, sum eru rørslutarnaðir ella hava avmarkaðan sálarligan førleika.”

Ítøkiliga verður ásannað um hetta sokallaða Markamót 1 í MArkamótsskjalinum, at

- ”Tað er ógreitt, hvør hevur ábyrgd av tænastunum til borgaran orsakað av vantandi nágreining og skilmarking av tænastunum røkt og stuðli.
- Stuðulstænastan er aldurstreytað og heimatænastan er ikki aldurstreytað.
- Borgarar, sum hava samansettan tørv hava tørv á røkt og stuðli og harvið tørv á heimatænastu og stuðulstænastu.”

Síðan verðu undir ”Niðurstøður og tilmæli” sagt um tað, sum partarnir eru samdir um, at:

”ein arbeiðsbólkur verður settur við 3 umboðum fyri kommununrnar og 3 umboðum fyri landið, sum gera neyðugar vegleiðingar til hetta markamóti, her í millum at nágreina og skilja sundur hugtøkini røkt og stuðul og annars onnur hugtøk, sum verða brúkt í lóg og kunngerð á hesum økinum.”

Sum skilst, og sum partarnir í hesum máli hava ført fram, er onki nevnivert úrslit komið burtur úr royndunum at seta arbeiðsbólk niður at nágreina nevndu hugtøk í lógini.

Niðurstøða:

Markamótsnevndin metir, at hóast borgarar, sum hesir tríggir, ið spurt verður um, hava samansettan tørv og hava tørv á bæði røkt og stuðli, so má teirra støða fyrst og fremst síggjast í ljósinum av, at teir hava tørv á stuðuli 24 tímar um døgnið, og at hesin stuðulin sum heild líkist meira einum samanhangandi stovnstilboði enn tí røkt, ið verður veitt til heimabúgvandi borgarar sambært § 9 í lógini um heimatænastu, eldrarøkt v.m.

Markamótsnevndin heldur tískil, at verandi stuðul, sum Almannaverkið veitir teimum trimum borgarunum, framhaldandi eigur at vera ábyrgd hjá Almannaverkinum sum eitt heildartilboð eftir § 32 b í forsorgarlógini.

Bárður Larsen, formaður

Ása Olsen

Katrin Danielsen